Sosialurin



## Heldur altjóða skráseting

Danska stjórnin er ikki nøgd við avgerðina hjá kanadisku stjórnini um, at øll skip, sum sigla ta sokallaðu Útnyrðingsleiðina millum Atlantshavið og Kyrrahavið, skulu lata seg skráseta hjá kanadisku myndugleikunum. Danski uttanríkisráðharrin, Lene Espersen, sigur við Berlingske Tidende, at einki einstakt land skal hava eina tílíka skráseting, tí slíkt skal gerast í altjóða høpi, sigur hon. Danmark hevur tí biðið Kanada um eina frágreiðing um málið, og partarnir hava avtalað at tosa um tað, sigur Lene Espersen við blaðið.



## Blóðug hevnd

Fleiri hundrað fólk eru deyð í ógvusligum ágangi í trimum bygdum í landspartinum Jos í Nigeria. Tíðindastovurnar skriva, at tað eru muslimar, sum hava lopið á tað kristna fólkið í bygdunum, og at talan helst er um hevnd fyri álop á muslimar í sama landsparti fyri nøkrum vikum síðani. Eingin veit við vissu, hvussu mong kristin eru deyð, men sagt verður, at talan er um minst 200. Álopsmenninir brúktu svørð og onnur gomul vápn, og teir vóru eirindaleysir, verður sagt. Í áganginum fyrr í ár, tá muslimarnir stóðu fyri skotum, lótu meiri enn 300 fólk lív, skrivar AFP.

# Maskinfólkini eru gullfiskarnir, sum vinnan spyr eftir



**– Útlitini hjá teimum, sum lesa okkara útbúgvingar á Vinnuháskúlanum, sera góð. Valið hjá monnum at taka eina maskinmeistaraútbúgving er eitt sera gott val, sum gevur hin besta pallin at stand á. Tit eru faktiskt gullfiskar, sum øll vinnan í heiminum ynskir at fáa fatur á, segði stjórin á Vinnuháskúlanum, Hans Jóhannes á Brúgv, tá hann helt gestarøðu á aðalfundi í Maskinmeistarafelagnum**

VINNUHÁSKÚLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Stór reiðaríir hava í februar í ár sett seg í samband við Vinnuháskúlan við áheitan um at fáa fatur á teimum, sum fingu prógv á jólum. Eisini ynskja reiðaríini at tosa við teir, sum eftir ætlan fáa prógv í juni í ár, segði Hans Jóhannes á Brúgv, stjóri á Vinnuháskúlanum, á aðalfundi í Maskinmeistarafelagnum*

*Mynd: Snæbjørn í Dali*

Á aðalfundi hjá Maskinmeistarafelagnum seinasta leygardag, hevði felagið fingið Hans Jóhannes á Brúgv, stjóra á Vinnuháskúlanum, at siga nøkur orð.

Í byrjanini av sínum røðu vísti stjórin til bókina hjá Finni Johansen um Maskinmeistaraskúlan, har hesin sigur, at hendan útbúgving byrjaði í Føroyum í 1965.

Hann helt fyri, at soleiðis eru eisini nógvir av limunum í Maskinmeistarafelagnum útbúnir maskinistar og maskinmeistarar á Maskinmeistaraskúlanum, sum nú er ein partur av Vinnuháskúlanum.

Stjórin vísti á, at henda útbúgving er broytt nakað, og í dag hanga maskinist- og maskinmeistaraútbúgvingarnar ikki saman, eins og tær gjørdu fram til ár 2004.

– Útbúgvingarnar eru nú tvær ymiskar útbúgvingar. Í dag eitur einki víðkað maskinmeistarútbúgving. Tann víðkaða maskinmeistaraprótøkan varð burtur í lógini frá 1988.

Hans Jóhannes á Brúgv kunnaði um, at maskinistútbúgving í dag tekur níggju mánaðir, og maskinmeistaraútbúgvingin tekur trý ár. Í hesum viðfangi nevndi hann eisini, at skipara- og skipsføraraútbúgvingarnar eru samanhangandi og taka hálvt annað ár hvør.

Stjórin segði, at í dag eru tilsamans 254 lesandi á Vinnuháskúlanum. Av hesum eru 110, sum lesa til maskinmeistara og 24, sum lesa til maskinist.

### Stórur áhugi

– Hesi seinastu árini hava fleiri reiðarí verið á skúlanum fyri endaprótøkuna, eins og setanarsamrøður hava verið prøvhandanardagin. Hetta skapar álit og stoltleika um fakið og vísir, at limirnir í Maskinmeistarafelagnum hava eina eftirspurda útbúgving.

Stjórin vísti á, at heimsbúskaparkreppan ávirkar okkum øll og harvið eisini teir nýútbúnu á Vinnuháskúlanum.

– Tó haldi eg meg kunna siga, at broytingin er, at lidnu næmingarnir nú bíða nakrar fáar mánaðir – og so býtir á, sum hann tók til.

Hans Jóhannes á Brúgv nam við, at vit í 2009 hava hoyrt um, at tey størru donsku reiðaríini hava sagt upp yvirmenn fyri síðan at seta fólk úr øðrum tjóðskapi umborð.

– Men her er longu broyting við at koma í. Stór reiðaríir hava í februar í ár sett seg í samband við Vinnuháskúlan við áheitan um at fáa fatur á teimum, sum fingu prógv á jólum. Eisini ynskja reiðaríini at tosa við teir, sum eftir ætlan fáa prógv í juni í ár, segði hann.

Stjórin á Vinnuháskúlanum vísti eisini á nøkur áhugaverd tøl hjá DREWRY, og her verður mett, at longu í 2013 verður ein tørvur á 56.000 offiserum kring um heimin.

– Harvið eru útlitini til tey, sum lesa okkara útbúgvingar á Vinnuháskúlanum, sera góð, helt hann fyri,

Hetta viðførir sjálvandi eisini, segði Hans Jóhannes á Brúgv, at korini gerast enn betri og koma orðini í lýsingum skúlans - makt, frítíð og pengar - at vera enn sjónligari í framtíðini.

Stjórin á Vinnuháskúlanum helt, at valið hjá monnum at taka eina maskinmeistaraútbúgving er eitt sera gott val, sum gevur hin besta pallin at stand á.

– Tit eru faktiskt gullfiskar, sum øll vinnan í heiminum ynskir at fáa fatur á, legði hann aftrat.

### Broytingar ávegis

Hans Jóhannes á Brúgvi vísti á, at broytingar eru fyri framman.

– Í øllum londum kring okkum eins og í øðrum londum við, eru útbúgvingarnar fyri maskinmeistarar og skipsførarar broyttar til útbúgvingar á bachelorstøði. Sum dømi um hetta kann nevnast, at allar maskinmeistaraútbúgvingarnar í Danmark vórðu broyttar til proffessionsbachelor í 2004. Soleiðis eru tað seks ár síðan, at danir framdu hesa broyting.

Stjórin vísti á, at Vinnuháskúlin setti niður ein arbeiðsbólk, og í 2006 varð álit sent landsstýrismanninum í mentamálum, har skúlin vísti á, at neyðugt er at fylgja við rákinum.

– Útbúgvingarráðið fyri útbúgving av fólki á sjónum, ið er mannað við umboðum frá Maskinmeistarafelagnum, SEV, Reiðarafelagnum fyri farmaskip, Føroya Reiðarafelag, Skipaeftirlitinum og Skipar- og Navigatørfelagnum, hava viðgjørt hetta mál. Niðurstøða er gjørd og sendi útbúgvingarráðið hin 21. apríl í 2008 tilmæli til Mentamentamálaráðið, har heitt varð á landsstýriskvinnuna um at skipa maskinmeistara- og skipsføraraútbúgvingarnar á bachelorstøði.

Hans Jóhannes á Brúgv segði, at fyrimunirnir við bachelorstøði eru, at vit tá fáa ein enn betri kvalifiseraðan maskinmeistara og skipsførara.

– Skipini veksa, motorarnir veksa, teknikkurin veksur, ábyrgdin økist og harvið krøvini til yvirmenninar. Samstundis økjast krøvini til aðrar tilknýttar fakbólkar